# Til Tvøroyrar eru øll vælkomin!

JENS JOHANNESEN
javnaðarlistin C



Javnaðarflokkurin hevur altíð havt nøkur virðir í samfelagnum, sum okur hava prioriterað sera frammaliga.
Tað eru tey sosialu og menniskansligu virðini, virðini fyri hvørjum einstøkum borgara.
Okur hava sæð stór framstig í Tvøroyrar Kommunu tey seinastu fýra árini.
Eitt tað størsta er ústykkingin í Heiðatrøðini, og fer hetta at gera møguleikan hjá fólki at keypa sær grundstykki í einum náttúruvøkrum umráði. Økið er barnavinarligt, tí her verður lítil ferðsla, blindvegur er, so her kunnu ungar familjur við børnum seta búgv í tryggum umhvørvi.
Afturat hesum er økið sett av, har okur ætla at byggja senioríbúðir og íbúðir við góðum atkomumøguleikum til m.a. fólk við skerdum førleika. Her verður hugsað um tann íbúðarpakkan, sum landsstýrismaðurin í almanna/heilsumálum fer at leggja fram.
Hetta eru ikki bert tankar, men handlingar, sum fara at geva tilkomnum/eldri fólkum møguleikan at flyta í eina minni íbúð, tá ið hús teirra verða ov tung at halda. Eisini verður atlit tikið til at trivnaðarøki er á staðnum við ymiskum hentleikum, bæði til gamans og álvara.
Onnur mál, sum m.a. eru nádd á sosiala økinum hetta valskeiðið:
• Sosial deild sett á stovn.
• Samstarv um barnaverndartænasta við Sumbiar,- Hovs,- Fámjins.- og Hvalbiar kommunu. (Vágur og Porkeri hava tikið seg burturúr samstarvinum.)
• Samstarv fingið í lag við kommunurnar í Sumba, Hovi, Fámjin og Hvalba um sosiala deild.
• Sambýlið tikið í brúk til gleði fyri búðfólk og starvsfólk.
• Kommunan er við í NSR-tænastuni.
• Mattænasta til pensionistar.
• Umsorganartænasta.
• Lektiucafé.
• Ungdómshús.
• Frítíðarskúlin er víðkaður frá 24 plássum til 40 pláss.
• Barnatannarøkt sett í verk.
• Systkinafrádráttur er farin at virka, fyri at nevna nøkur dømi!
Men jeg eri ikki ferdigur.
**Visiónirnar eru:** Eldrasentur, vitjanartænasta, serstovnur, stuðulsstovnur, nýggj spælistova, bert fyri at nevna nøkur innan sosiala økið.
**Okra endamál er:** at tað skal verða gott at búgva í Tvøroyrar Kommunu.
Vel rætt!
Vel Jens Johannesen, javnaðarlistin C

# Verkið sigur meiri enn orðini

Allir politisku flokkarnir ynskja musikkskúlanum alt gott. Teir fegnast allir um tey góðu úrslit musikkskúlin hevur havt. Tónleikalívið blómar sum aldri áður og føroyingar gera seg galdandi í tónleikakappingum bæði her og har. Tónleikur er høgt virðismettur og tá ið okkurt høvi er, halda øll, at tað er gott við tónleiki til at seta dám á átakið. Ung spæla til konsertir í hópatali, og tað er eyðsæð at hettar eru øll sera glað og stolt um.
Tað er tí ilt at skilja, hvussu tað ber til, at allur hesin jaligi viljin, øll hesi rósureyðu orðini ikki hava haft nakað ítøkiligt við sær. Teir karmar, sum musikkskúlin hevur at virka í, eru út av lagi vánaligir. Øll vita tað, tað hevur verið alment frammi, hvussu vánlig hølini í Skansastovu eru og hvussu trongligt tað er á Frúutrøð.
Hvussu ber tað til at einki er hent? Hava øll hesi føgru orðini einki uppá seg?
Okkum tørvar politikarar, sum tora og duga at síggja framtíðina fyri sær, sum standa við síni orð og sum duga at síggja møguleikarnar í, at øll børn í Tórshavnar Kommunu fáa møguleikan at fáa frálæru í tónleiki og at tað almenna tónleikastøðið verður hækkað. Politikarar, sum innan hettar økið tora at fara til verka.
Latum okkum leggja alt tað keðiliga og troyttandi grenji afturum – musikkskúlin hevur prógvað sítt virði - á nógvum økjum við betri úrslitum enn nakar hevði ímynda sær. Tónleikurin í Føroyum ger um seg - eisini í útlondunum.
Hugsi tykkum, hvat vit - politikarar, tónleikalærarar, foreldur og børn - saman kundu útint, um vit høvdu karmarnar. Ein íløga verd at gera - við vissu fyri stórum vinningi!
Gev atkvøðu tína til fólk, sum tú ert vísur í tora at gera orð til verunleika.

**Lærararáðsnevndin**
**Tórshavnar Musikkskúla**
**Bernhardur Wilkinson**
**Gudmund Mortensen**

# Býurin og skúlarnir

ALBERT ISFELD
arkitektur
Listi E



**Vit skulu í gongd við at planleggja ella byggja skúlar á miðnámsstøði, á bachelorstøði og á mastersstøði. Vit skulu eisini byggja næmingaheim, so allir føroyingar kunnu fáa holla utbúgving í Havn og ikki altíð verða noydd av landinum, tað skal verða teirra egna val, um tey lesa í Havn ella í Oxford**

Vit hava sæð, at býurin Akureyri á Norðurlandinum í Íslandi, sum er sama stødd sum Havnin, hevur havt universitet síðani 1987. Har eru 1.400 lesandi, ið húsast í nýmótans bygningum, sum eru gjørdir til endamálið at lesa og granska í. Vit hava havt fróðskaparsetur nú í nógv ár, og hevur okkara universitet bara vánalig og óegnaði høli at vera í. Vit eiga at gera eitt arbeiði fyri, at universitetið fær hóskandi karmar at vera í, og um landsstýrið ikki fær uppí lag, skal Tórshavnar komuna sjálv byggja nýtt universitet og leiga landsstýrinum hølini.
Skúlaøkið sum heild skal mennast, og hýsast í nýggjum egnaðum hølum.
Mann kann leggja afturat, at kommunan eisini kundi bygt umsitingarbygningar til Landið at leiga, tá Landið nú ikki fær uppí lag at byggja sjálvt. Vit sóu eitt pínligt dømi herfyri, tá ið tann pinkulítli løgmaðurin blásti seg upp og gjørdi okkum øllum og mest sær sjálvum fyri skommum í tí sokallaða skrivstovumálinum í Tinganesi.
Vit mugu koma burturúr amatørtilgongdini til stovnan av skúlum. Hetta skal galda fyri alt frá fólkaskúlum, miðnámsskúlum og ymsar fakskúlar og upp á universitetsstig.
Sum náttúrligur partur av øllum hesum skulu sjálvandi esini verða bygd næmingaheim fyri tey, ið koma aðrastaðni frá ella ikki kunnu búgva heima. Raðfestingar á fíggjarætlanini skulu gerast í samsvari við hesum, so arbeitt verður miðvíst yvir eitt áramál fyri at røkka hesum málsetningum.

# Forslag til en mere rentabel drift

ERIK CHISTENSEN
Porkeri

Norröna er ikke velegnet til vintersejlads på Nordatlanten. Mange passagerer flyver hellere om vinteren, sejlturen er for ubehagelig og for dyr.
Shetland - Bergen - Skotland har altid givet underskud og der er ikke blevet handlet i tide for at lukke dem.
Om vinteren sejler Norröna overvejende med fragt, men det er urentabeltskibet har for megen overflødig vægt som koster olie.
Der har været for mange udskiftninger i ledelsen.
På grund af de dyre billetpriser, er det ikke dyrere at flyve, hvis man lejer en billig bil.
2 færger som "Smyril" (færgen mellem Tórshavn og Suðuroy) ville være mere økonomisk og driftsikker. Den ene kunne sejle Esbjerg - Tórshavn og den anden Tórshavn - Island. De kunne alt efter årstid sejle en eller to gange om ugen. Om sommeren kunne Skotland og Bergen eventuelt inddrages i sejlplanen.
Esbjerg er mere velegnet end Hanstholm. Den ligger mere centralt for den største del af den danske befolkning og for Europa.
Færgerne behøver ikke at være linere med overdrevet luksus. Et cafeteria med billige priser og enkle men gode kabiner, vil de fleste være tilfredse med.
Kort og godt - en eller to driftsikre passagerfærger med rimelige priser.
Flere gange har Norröna været i alvorlige vanskeligheder. En gang hvor motoren stoppede, var den lige ved at kæntre. (ifølge et besætningsmedlem) Den er alt for højt bygget til at klare de ofte stærke storme i Nordatlanten.

# Leiðslan á Klaksvíkar Sjúkrahúsi tikin av ræði

JÁKUP PETERSEN
yvirlækni



Boð eru nú komin frá Heilsumálaráðnum, at settur verður heilsuverkstjóri sum kemur at taka ræði av leiðsluni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.
Teir sjúklingar sum hildu, at niðurleggingin av kommunulæknavaktini í Norðuroyggjum varð endin á javna álopinum á sjúklingatrygd í Norðuroyggjum noyðast tíverri út í enn størri vónloysi. Nú verður leiðslan á Klaksvíkar Sjúkrahúsi eisini tikin av ræði.
Settur verður nú ein heilsuverkstjóri í Heilsumálaráðnum, sum skal taka sær av starvsfólkamálum, fíggjamálum, hølisviðurskiftum, rakstri og annars hava rætt til at taka stig innan øll øki á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.
Tað vil siga, at hesin heilsuverkstjóri kemur at loysa úr starvi og seta starvsfólk á Klaksvíkar sjúkrahús, hann kemur at taka avgerð um játtanina til Klaksvíkar Sjúkrahús og hava myndugleika til at flyta peningin til annað sjúkrahús, um hann heldur tad vera betri. Hann kann niðurleggja kanningar og viðgerðir, og hann skal taka sær av rakstrinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.
Her verður onki eftir til leiðsluna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi at taka sær av, og verður hon sostatt broytt til eina skrivstovu undir stjóranum.
Eg kenni tað sum mín rætt og plikt at kunna borgarnar um hetta.